# Haldið Sosialin!

## 400,- kr. um ársfjórðingin

## - sparið 380,- kr. í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______________

Bústaður: ______________

Postnr.: ______________

Bygd/býur: ______________

Telefon nr.: ______________

Undirskrift: ______________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin


# ítróttur

Nr. 186 • hósdagur • 2. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB eigur bestu úrslitini í ungdómsdeildunum

**Úrslitini benda á, at tilgongdin úr yngru deildunum fer at vera stór til bestu deildirnar tey næstu nógvu árini**

### HB FM HEITI Í YNGRU DEILDUNUM

*Jóannes Hansen*

Sunnudagin vann HB FM heitið í 1. deild hjá monnum. Hetta var fimta FM heitið hjá felagnum í ár. Talan er ikki um met í felagnum, men eingin ivi er um, at HB er mest vinnandi felagið av øllum í hesum kappingarárinum. Tað hava teir so ofta verið, og einki er at ivast í, at felagið fer at seta øll segl fyri at næsta ár skal gerast so sermerkt, sum tað á nakran hátt skal bera til. HB verður hundrað ár 17. oktober í 2004, og tað ætla teir at hátíðarhalda á so ymiskan hátt. Sjálvandi hevði tað verið dreymakrúnan á verkinum, um felagið næsta ár hevði vunnið fleiri FM heiti – bæði í eldru og yngru deildunum.

At HB eigur bjarta framtíð hava úrslitini í yngru deildunum í ár verið staðfesting av. Umframt í 1. deild hjá monnum hevur felagið vunnið FM í unglingadeildini, piltadeildini, smápiltadeildini og í gentudeildini. Í teimum deildunum, har felagið ikki hevur vunnið FM, hava liðini verið heilt tætt undir gullinum. Dømi um hetta eru dreingjadeildini, smádreingjadeildin og smágentudeildin.

Fleiri av unglingaspælarunum hava í ár verið ímillum spælararnar, sum besta liðið hevur verið valt ímillum. Her verður hugsað um Rók Jespersen, Bjarna Jørgensen, Rana D. Christiansen, Páll M. Joensen, málverjan Poul Næss Joensen, liðformannin Eli Thorsteinsson og Emil Nolsøe Leifsson. Merkisvert er tað, at Rasmus Nolsøe, sum býr á Tvøroyri og spælir við TB í 2. deild, hevur spælt við unglingaliðnum hjá HB. TB hevur ikki havt unglingalið við í kappingini í ár.

Allir teir omanfyri hava longu víst, at teir eru á gáttini til at gerast 1. liðs spælarar, og onkur teirra hevur longu spælt fleiri

*Framhald á næstu síðu*



*HB gentur. FM vinnarar og steypavinnarar 2003. Standandi: Sigmundur P. Mikkelsen, venjari, Súsan Thomsen, Katrin Clementsen, Ása úr Dímun, Unn Kragesteen, Kristina D. Simonsen, Valborg Heinesen, Malan á Dunga, Rannvá Poulsen, Nanna Gade, Andras K. Thomassen, venjari. Húkandi: Bjørg Syderbø, Ella Joensen, Barbara á Dunga, Randi Wardum, Linda Weihe og Bára á Dunga*




*HBa smápiltar. FM vinnarar 2003. Standandi frá vinstru: Páll Mohr Joensen, venjari, Frank Askhildsen, Tróndur Jensen, Rene Joensen, Rókur F. Jespersen, venjari. Húkandi frá vinstru: Høgni Klein Olsen, Alexandur Larsen Black, Ivan Hofgaard, Sverri Mohr Mortensen og Allan Hansen.*


Vøruvognur til sølu




Í sera góðum standi

Nærri fæst at vita við at ringja 214680 ella 214681

IDEmøblar